## Neyðlendi

Eitt flogfar hjá norska flogfelagnum Widerøe sendi í gjárkvøldið neyðarkall, tí ein av motorunum var slóknaður. Flogskiparin bað um loyvi at neyðlenda á flogvøllinum í Bodø, og har varð øll tilbúgvingin sett í verk alt fyri eitt. Ein góðan hálvan tíma seinni, stutt fyri klokkan hálvgum tíggju okkara tíð, neyðlendi flogfarið í øllum góðum. Flogfarið var á veg úr Værnes til Bodø, tá ein av motorunum slóknaði, og málið verður kannað í dag.



*Hetta flogfarið neyðlendi í Japan fyrr í vikuni. Hvørki ferðafólk ella manning fingu skaða*

# illiónir burtur um árið



*Leiðslan á Landssjúkrahúsinum er skipað eftir einum leisti sum illa fæst at virka aðrastaðni og hon virkar heldur ikki hjá okkum. Avleiðingin er, at leiðslan á Landssjúkrahúsinum í stóran mun fæst við onnur viðurskifti enn tað, hon skuldi fingist við, er lemjandi atfinningin hjá Jákupi Petersen, yvirlækna á Landssjúkrahúsinum*

- Nevndin setur so krøv um dygd, virksemi, tænastu o.s.fr. Sjálvan raksturin stendur tað síðani heilt til sjúkrahúsleiðslurnar at taka sær av.

- Undir hesi skipan verða tað heilt greiðar spælireglur millum politikarar og sjúkrahúsini. Politikarnir seta vegna borgarnar krøv til sjúkrahúsini, men luttaka ikki í rakstrinum.

Jákup Petersen heldur, at ein loysn í Føroyum kundi verið at rammujáttanin liggja sum botnur og oman á hesum skal so arbeiðast við skipanum so sum konstraktjáttan, peningur fylgir sjúklingi og at skilja sundur millum játtandi myndugleika og sjúkrahúsini.

- Tað er av stórum týdningi at øll 3 sjúkrahúsini fara burtur frá seingjardagauppgerðini og yvir til diagnosuuppgerðina, so vit fáa kostnaðin fyri kanning og viðgerð av tí einstaka sjúklinginum við tí einstøku diagnosuni. Sum nú er ber illa til at sammeta aktivitetin á føroysku sjúkrahúsunum.

- Harafturat er tað neyðugt, at vit fáa tamarhald á støðuni viðvíkjandi viðgerð uttanlands. Soleiðis at tað eisini her verður gjørd kostnaðarmeting fylgjandi diagnosuni fyri, at tann deild sum tekur viðgerðir heim beinleiðis kann rokna út hvussu nógvur peningur fylgir við.

- Fyrst tá kemur áhugi og ferð á heimtøku av viðgerðum, sigur Jákup Petersen.

Nógv meiri um hetta í grein hjá Jákupi Petersen aðrastaðni í blaðnum og í teimum komandi bløðunum.

# Løgtingsformaður hartar konslar

**Útlendskir konslar eiga ikki at reka føroyskan uttanríkispolitikk, heldur Edmund Joensen, sum finst at Poul Mohr og Poul Michelsen fyri at leggja set út í kjakið um flaggspurningin. – Láturligt av løgtingsformanninum, heldur Poul Michelsen**

POLITIKKUR
*Kári Mikkelsen*
*karim@sosialurin.fo*

Kjakiðum flaggspurningin á føroysku sendistovuni í Reykjavík koyrir framvegis í hægsta geari. Nú leggur sjálvur løgtingsformaðurin seg út eyma spurningin.

Í blaðnum í dag finst hann at íslendska og finska konslunum í Føroyum, Poul og Poul við ávikavist Mohr og Michelsen til eftirnavn, ið hava funnist at, at tað skal flaggast við Dannebrog á føroysku sendistovuni, sum letur upp seinni í ár.

Edmund Joensen heldur, at Føroyar munnu vera tað einasta landið í heiminum, ið letur um seg ganga, at konslar úr øðrum londum av sínum eintingum leggja politiskt trýst á landsins stjórnarleiðara, løgmann, og parlamentið, Løgtingið.

»Skuldi tað hent, sum er óhugsandi í øðrum londum á uttanríkispolitiska økinum, at konslarnir hjá ávikavist Íslandi og Finnlandi í Føroyum hava handlað í ósamsvari við teirra lands almenna uttanríkispolitikk, so er hetta ein sera álvarslig søk fyri teir. Annar teirra mælti enntá til nývals«, skrivar løgtingsformanninum í viðmerkingini, sum stendur at lesa á síðu 10.

Hvørki Poul Michelsen ella Poul Mohr vilja taka atfinningarnar frá Edmundi Joensen til eftirtektar.

- Eg úttalaði meg als ikki sum konsul, men sum ein vanligur føroyingur, ið bara segði sína hjartans meining, sum eg má hava loyvi til, er einasta viðmerking frá Poul Mohr.

Poul Michelsen, ið sum kunnugt eisini er løgtingsmaður og partur av samgonguni, hevur heldur ikki nógv til yvirs fyri atfinningunum hjá løgtingsformanninum.

- Tað er sera langt úti, at løgtingsformaðurin setir konsulheitið hjá mær omanfyri fyri tað at vera løgtingsmaður. Fyri mær fer løgtingsembætið altíð at standa omanfyri postin sum konsul. Tí sum konsul eri eg als ikki partur av tí politisku skipanini í Finnlandi, men skrivstova okkara hevur fyri tað mesta praktiskar uppgávur, sum til dømis at vegleiða ella hjálpa finnum í Føroyum. Tí kann eg ikki taka atfinningina fyri frá Edmundi Joensen fyri fult. Sum finskur konsul havi eg ongi politisk forpliktilsir, sigur Poul Michelsen.